Vikuskiftis Sosialurin




## Vágur vil hava gamlar myndir

Um ein góðan mánað hátíðarheldur Vágs Kommuna 100 ára føðingardag. Í hesum sambandi er løgd ein fjølbroytt skrá, sum fevnir um alla viku 40 frá 1.- 7. oktober. Á skránni eru eisini myndaframsýningar og í hesum sambandi heitir kommunan á fólk um at læna fyrireikarunum myndir úr kommununi, skrivar Suðuroyarportalurin. Sóknast verður eftir myndum úr Vági, av Nesi, úr Fámará, úr Botni, av bygda- og grannaløgum í Vági, av vinnulívinum í Vági, av fiskaarbeiði í Vági – til dømis breiða fisk, sildatíðin, Suðurfisk, Polarfrost o.s.fr. – av skipum í Vági, av fólki til arbeiðis, av fólki í frítíðarítrivum – t.d. í hoyna, ullarroyting, á útferð, ítrótt, almenn tiltøk o.s.fr.

# Nógvir veljarar flyta seg



**Í veljarakanningini, ið Fynd gjørdi fyri Sosialin fyri viku síðani, vóru stórar broytingar síðani seinasta val. Tveir av samgonguflokkunum mistu nógv, tveir av andstøðuflokkunm gingu fram í stórum. Tá so er, verður spurt: Hvagar fara tær mistu atkvøðurnar, hvønn leita hesir veljararnir til?**



VELJARAKANNING
*Jógvan Mørkøre*
*samfelagsfrøðingur*

Í kanningini misti Fólkaflokkurin góð tvey prosent, Javnaðarflokkurin hálvt fjórða. Tjóðveldisflokkurin gekk hinvegin hálvt fjórða prosent fram. Men serliga Miðflokkurin hevði góðan byr; hann fór fimm prosent fram og tvífaldaði síðani undirtøku millum veljararnar.

### Hvagar fóru tey?

Hjá flokkinum í afturgongd reisir spurningurin seg, hvønn hann mundi missa veljarar til?

Fólkaflokkurin missur serliga til Tjóðveldisflokkin og Miðflokkin, 5-6 prosent til hvønn. Men okkurt fer eisini til Sambandsflokkin og Sjálvstýrisflokkin, eini 2-3 prosent til hvønn. Mest fer kortini til tann óvissa bólkin, tvs. tey, ið siga seg annaðhvørt vilja atkvøða blankt, ikki ætla sær á val ella ikki vita at svara. 17 % av misnøgdum fólkafloksveljarum fara í henda bólkin; fyri íla so at siga.

Tað sama ger seg galdandi fyri misnøgdu veljararnar hjá Javnaðarflokkinum. Her eru somuleiðis 17 prosent farin upp í henda óvissubólk. Eins og hjá Fólkaflokkinum er ikki talan um, at ein stórur blokkur av veljarum er farin frá honum til ein ávísan annan flokk. Javnaðarflokkurin missur kortini eini 14 prosent til hinar flokkarnar á tingi, eini 3-4 prosent í part til Fólkaflokkin, Sambandsflokkin, Tjóðveldisflokkin og Miðflokkin.

So afturgongdin hjá teimum báðum samgonguflokkunum kann tykjast ógvuslig. Spurt varð, "um val varð í dag". Men val var kortini ikki talan um í veruleikanum. Og tað plagar at vísa seg, at misnøgdir veljarar, sum brúka veljarakanningar sum eitt høvi at vísa flokkinum hjá sær sína misnøgd, oftani leita sær aftur higani, tey komu, tá ið veruligu valdagurin verður.

### Hvaðani komu tey?

Hjá flokkinum í framgongd reisir spurningurin seg: Hvørji eru hesi, ið nú leggjast afturat?

Minni enn helvtin av teimum, sum nú vísa Miðflokkinum sín stuðul, atkvøddu fyri honum á seinasta vali. Tey, ið streyma til, koma serliga úr Fólkaflokkinum og Tjóðveldisflokkinum, 17 prosent frá hvørjum. Men hinir báðir teir stóru, Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin lata eisini eini 5-7 prosent í part.

Tað, sum nú rennur til Tjóðveldisflokkin, kemur úr ymsum ættum. 2-3 prosent frá hvørjum av hesum flokkunum: Fólkaflokkinum, Javnaðarflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum. Men hann fær eins nógv frá fólki, ið ikki vóru á vali seinast, annaðhvørt tey ikki høvdu valrætt, ella valdu at sita við hús.




| Frá \ Til (%) | Fólkafl. | Sambandsfl. | Javnaðarfl. | Sjálvstýrisfl. | Tjóðveldisfl. | Miðfl. | Hin Stuttligi | Blankt/ikki á val/veit ikki | Tilsamans | N= |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fólkaflokkinum | 67 | 3 | 0 | 2 | 5 | 6 | 0 | 17 | 100 | 117 |
| Sambandsflokkinum | 5 | 77 | 4 | 0 | 2 | 2 | 1 | 10 | 100 | 108 |
| Javnadarflokkinum | 3 | 4 | 70 | 0 | 4 | 3 | 0 | 17 | 100 | 106 |
| Sjálvstýrisflokkinum | 5 | 5 | 0 | 59 | 14 | 0 | 0 | 18 | 100 | 22 |
| Tjódveldisflokkinum | 1 | 1 | 0 | 2 | 89 | 4 | 0 | 4 | 100 | 178 |
| Midflokkinum | 0 | 13 | 0 | 0 | 0 | 78 | 0 | 9 | 100 | 23 |
| Hin Stuttliga | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 100 | 100 | 3 |
| Ikki valrætt | 21 | 8 | 4 | 0 | 42 | 4 | 0 | 21 | 100 | 24 |
| Ikki á vali | 10 | 3 | 10 | 0 | 23 | 10 | 0 | 43 | 100 | 30 |
| Veit ikki/vil ikki svara | 0 | 20 | 0 | 0 | 0 | 20 | 0 | 60 | 100 | 5 |

| Til / Frá (%) | Fólkafl. | Sambandsfl. | Javnaðarfl. | Sjálvstýrisfl. | Tjóðveldisfl. | Miðfl. | Hin Stuttligi | Blankt/ikki á val/veit ikki |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fólkaflokkinum | 80 | 4 | 0 | 11 | 3 | 17 | 0 | 23 |
| Sambandsflokkinum | 5 | 83 | 5 | 0 | 1 | 5 | 100 | 13 |
| Javnadarflokkinum | 3 | 4 | 90 | 0 | 2 | 7 | 0 | 21 |
| Sjálvstýrisflokkinum | 1 | 1 | 0 | 72 | 2 | 0 | 0 | 5 |
| Tjódveldisflokkinum | 2 | 1 | 0 | 17 | 83 | 17 | 0 | 8 |
| Midflokkinum | 0 | 3 | 0 | 0 | 0 | 43 | 0 | 2 |
| Hinum Stuttliga | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 3 |
| Ikki valrætt | 5 | 2 | 1 | 0 | 5 | 2 | 0 | 6 |
| Ikki á vali | 3 | 1 | 4 | 0 | 4 | 7 | 0 | 15 |
| Veit ikki/vil ikki svara | 0 | 1 | 0 | 0 | 0 | 2 | 0 | 3 |
| **Tilsamans** | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| **N=** | 97 | 100 | 82 | 18 | 190 | 42 | 1 | 7 |